## Einki rok av bretum

Fyrireikararnir av HM-kappingini í fótbólti í Týsklandi stúrdu fyri degnum, tá ið Ongland fór úr kappingini. Roknað varð við, at hetta fór at hava ófrið við sær. Men soleiðis var als ikki. Leygardagin reyk Ongland úr kappingini eftir brotssparkskapping ímóti Portugal, men bretsku áskoðararnir gjørdu einki um seg .

- Vit hava handtikið nakað av fólki, men tað er einki afturímóti tí, sum vit kundu havt roknað við, sigur Gerd Graus, talsmaður fyri fyrireikararnar

Eini 700 bretskir áskoðarar eru tiknir fyri vánaligan atburð undir HM, men í øllum førum var talan um minni brot, og ongantíð kom tað til veruligar samanbrestir millum áskoðarar.

## Beckham gevst sum liðformaður

Sunnumorgunin kunngjørdi David Beckham við gráturødd, at hann gevst sum liðformaður á enska landsliðnum. Avgerðin hjá Beckham kemur í kjalarvørrinum á tapinum fyri Portugal í fjórðingsfinaluni leygardagin, sum sendi Ongland úr HM kappingini.

- Hetta hevur verið ein dreymur. Eg havi verið ómetaliga errin av at hava verið liðformaður fyri enska landsliðið og tað fari eg altíð at vera takksamur fyri, segði Beckham

Hann hevur annars verið liðformaður í seks ár og hevur staðið á odda fyri liðnum í 58 landsdystir. Sjálvur hevur Beckham spælt 95 landsdystir fyri Ongland, og hann ætlar sær framvegis at vera til taks hjá liðnum.

# Gylti fóturin gjørdi enda á Onglandi

**Øll bíðaðu eftir, at gylti fóturin hjá Wayne Rooney skuldi koma fyri seg til HM-endaspælið og skjóta Ongland í HM-finaluna. Men leygardagin var hesin nógv umtalaði fótur viðvirkandi til, at Ongland reyk út úr HM-kappingini**

HM
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Ensku HM-dreymarnir liggja enn einferð í knúsi. Leygardagin spældi Ongland fjórðingsfinalu ímóti Portugal, og enn einaferð noyddist Ongland úr einum endaspæli eftir brotssparkskapping.

Ensku stjørnurnar vóru púra eiðasørar at skjóta brotssparkini, og teir skoraðu bert einaferð við fýra spørkum. Stjørnur sum Steven Gerrard og Frank Lampard kláraðu ikki at fáa bóltin í málið, og tað tykist næstan, sum at Ongland er gandað í brotssparkskappingum.

- Um tað so var brotssparkskapping ímóti manningini á Sundaberg, so hevði Onglandi ikki klárað at vunnið, tók onkur til eftir dystin.

Spælararnir hjá Portugal misnýttu tvey brotsspørk, men teir fingu hini trý í málið, og tað var nóg mikið til at vinna dystin og koma í hálvfinaluna.

Týski miðvallarspælarin Tim Borowski segði eftir enska tapið, at landsliðsspælararnir hjá Onglandi klára ikki skjóta brotsspørk.

- Teir hava heilt einfalt ikki nervarnar til brotssparkskappingar. Vit eru munandi meira kaldir frá 11 metrum, sigur Borowski og gníggjar salt í enska sárið.

**Rooney reyk út**

Ein tann mest umtalaða hendingin í dystinum var, tá ið stjørnan á enska landsliðnum, Wayne Rooney, fekk reyða kortið frá dómaranum. Eftir ein nærdyst tíðliga í seinna hálvleiki traðkaði Rooney millum beinini á einum av portugisisku verjuspælarunum, og so fekk hann reyða kortið.

Tá hevði Ongland havt gott tak á dystinum, men eftir útvísingina løgdu teir dent á at verja.

Undan HM-kappingini varð nógv tosað um fótin hjá Wayne Rooney. Í einum dysti seint í kappingarárinum breyt Rooney fótin, og tað var ivasamt, um hann kundi spæla við í HM. Gylti fóturin var á nógvum forsíðum, og hann gjørdist frískur til kappingina.

Leygardagin varð fóturin tó brúktur til annað enn tað, ið hann var ætlaður til. Rooney traðkaði seg til eitt reytt kort, og so gjørdust fortreytirnar hjá enska liðnum sera trupular.

Nú er væntandi, at Rooney fer at standa fyri skotum, tá ið hann kemur heimaftur til Onglands at spæla. Hetta mátti David Beckham sannað, tá ið hann varð vistur út í avgerandi dysti ímóti Argentina í 1998.



*Wayne Rooney loypir fram av og traðkar á ein liggjandi spælara hjá Portugal. Hetta fekk hann reyða kortið fyri. Mynd: Scanpix*

Liðformaðurin hjá Liverpool – vanliga argasta kappingarneyta hjá Rooney og Manchester United – heitir á fólk um at lata Rooney fáa frið.

- Wayne hevur verið fantastiskur fyri okkum. Vit kunnu ikki geva honum skyldina fyri tapið. Hann hevur gjørt so nógv gott fyri liðið, og hann fer at hava nógv at siga fyri okkum í framtíðini, sigur Steven Gerrard.



# Zidane legði Brasil niður

**Eftir eitt hálvvánaligt kappingarár var Zinedine Zidane aftur í gamla lagnum, tá ið hann leygardagin legði Brasil fyri sínar føtur og stjól myndina frá øllum teimum brasilsku stjørnunum**

HM
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Frakland vann seg leygarkvøldið í hálvfinaluna í HM-endaspælinum. Fraklendingar vunnu dystin ímóti brasilsku heimsmeistarunum, og sigurin var fult uppiborið.

Franska liðið var væl skipað, tamdi fullkomiliga brasilsku stjørnurnar sum Ronaldinho, Ronaldo og Kaka, og í álopspartinum var Frakland hvassari enn Brasil.

Zinedine Zidane – einaferð mettur sum heimsins besti spælari – var aftur í gamla lagnum. Zidane spældi ein framúr dyst, og hann legði upp til málið, ið Thierry Henry skoraði. Zidane hevur boðað frá, at hann gevst at spæla fótbólt í summar, og eftir eitt hálvvánaligt kappingarár fyri Real Madrid vóru tað mong, sum hildi, at tað var rætta avgerðin.

Undir HM er rættiligt lív komið í Zidane aftur, og seinastu tveir dystirnar hevur hann veruliga glógvað á franska miðvøllinum. Ímóti Spania legði hann upp og skoraði, og ímóti Brasil legði hann upp og brilleraði í spælinum á miðvøllinum.

Brasilsku stjørnurnar fingu ongantíð rættiligt flog á spælið hjá sær í hesi HM-kappingini, og ímóti Fraklandi vildi liðið heilt einfalt ov lítið. Tað hevði við sær, at væl skipaða og sterka franska landsliðið vann og kom í hálvfinaluna.

Brasiliumenn stóðu eftir við stórum vónbroti, og tað man vera stór sorg í tí fótbóltsglaða landinum í Suðuramerika í hesum døgum.

*Zidane gjørdist stóri maðurin í dystinum hjá Fraklandi ímóti HM-favorittunum úr Brasil*

*Mynd: Scanpix*